# Bogaskjúttar kappaðust um FM

**Síðsta vikuskiftið skipaði Bogaskjótifelagið Tambar í Havn fyri føroyameistara kappingum bæði fyri ung og vaksin. Leygardagin skutu tey ungu 15 metur og sunnudagin skutu tey vaksnu 18 metur.**

BOGASKJÓTING
*Tíðindaskriv*

Hesaferð var metstór luttøka í recurve bólkinum við ikki færri enn 23 luttakarum. Í byrjanini og fram til steðgin var sera javnt millum fýra teir fremstu skjúttarnar, men síðan var tað tann eini, sum dró frá og legði seg klárt á odda.

Innleiðandi úrslitini í recurve vóru: nr. 1 Sjúrður Rein, Tambar, 556 stig, nr. 2 Eirikur á Kletti, Tambar, 534 stig og persónligt met, nr. 3 Nikkel Petersen, Ørvur, eisini 534 stig og persónligt met, men hevði Eirikur fleiri 10-arar enn hann, og nr. 4 Bogi Ákason, Vágaskot, 513 stig.

Í finaluskjótingini vóru tað eisini hesir fýra, sum stóðu seg best og komu allir til hálvfinalurnar, har skutu Sjúrður og Bogi í fyrra dystin, sum Sjúrður vann113-109, meðan hin dystin vann Nikkel á Eiriki við111-103.

Bronsufinalan var millum Eirik og Boga og enda›i 112-104.

Finalan gjørdist sera spennandi og var tað Nikkel, sum legði stórt trýst á Sjúrð og førdi hann allan vegin við tveimum stigum, tá farið varð undir síðstu 3 pílarnar. Sjúrður tók tá eitt stig meiri enn Nikkel í fyrsta og øðrum píli, so tað stóð á jøvnum áðrenn síðsta píl og eisini her megnaði Sjúrður at fáa eitt stig meiri og vinna dystin 105-104.

Nýggjur føroyameistari fyri ung á 15 metur bleiv sostatt Sjúrður Rein, Tambar.

Innleiðandi úrslitini í compound, har bert fýra luttóku: nr. 1 Kaj Johannesen við 561 stigum, nr. 2 Magnus Andreassen við 558 stigum, nr. 3 Helgi Lamhauge við 524 stigum og nr. 4 Sonni Gaardbo við 523 stigum. Allir skjúttarnir úr Ørvi og tríggir teir síðstu settu persónlig met.

Í fyrru hálvfinalu var dystur millum Kaj og Sonna, sum endaði 113-105, og hin hálvfinalan var millum Magnus og Helga, sum endaði 110-105.

Bronsufinalan var millum Helga og Sonna og var sera spennandi, tí dyrsturin bleiv ikki avgjørdur fyrr enn síðsta píl og vann Helgi 100-99.

Í finaluni møttust Kaj og Magnus, her gjørdi Kaj bart og við nýggjum føroyskum meti fyri 12 pílar vann hann dystin 117-109, og bleiv hann sostatt fyri ung á 15 metur nýggjur føroyameistari.


*Magnus Andreassen, Ørvur, ársins skjútti í compound*


*Kaj Andreasen, Ørvur, føroyameistari í compound*


*Sjúrður Rein, Tambar, føroyameistari og ársins skjútti í recurve*

**Ársins skjúttar**

Bogaskjótideildin velur á hvørjum ári ársins skjúttar í ávikavist recurve og compound, og verður her hugt eftir, hvussu ágrýtnir teir hava verið til venjing, hvussu teir eru mentir sum bogaskjúttar, framgongd og støðufesti o.s.fr..

Fyri recurve skjúttarnar bleiv ársins skjútti Sjúrður Rein, Tambar, sum m.a. hevur sett fleiri persónlig met og hevur skotið í miðal yvir 50 stig meiri í hvørjum dysti, enn hann gjørdi í fjør.

Fyri compound skjúttarnar bleiv ársins skjútti Magnus Andreassen, Ørvur, sum seinastu árini hevur verið við, og nú hann hevur fingið egnan boga, hevur hann verið sera ágrýtin og sett sær stórt mál fyri árið. Eisini hevur hann skotið fleiri persónlig met og lagt seg á eitt støði, sum er meiri enn 50 stig hægri enn í fjør.

Við sínum úrslitum hava hesir báðir saman við 3 øðrum megnað krøvini til luttøku í kappingini um danska meistaraheitið fyri ung, sum verður í Aalborg leygardagin 25. mars.

Kappingin bleiv stuðlað av Statoilstøðini í Saltangará.

**Tey vaksnu**

Sunnudagin var túrurin komin til tey vaksnu, sum skutu 18 metrar. Í recurve bólkinum vóru 11 luttakarar og er hetta tað mesta í mong ár, ímeðan tað var stórt mannfall hjá compound skjúttunum vegna sjúku og luttóku tí bert tveir skjúttar hesaferð.

Í compound vann Jógvan Niclasen, Tambar innleiðandi við 571 stigum og skeyt hann her javnt við sítt persónliga met. Nr. 2 bleiv Anders Jønsson, Ørvur, við 519 stigum.

Finalan teirra millum endaði við sigri til Jógvan 115-108, og vann Jógvan sostatt føroyameistaraheitið í compound.

Í recurve bólkinum var tað Øssur Hansen úr Vágaskot, sum legði seg á odda, men dragnaði nakað aftur móti endanum í kappingini.

Innleiðandi úrslitini vóru: Rógvi Mohr, Ørvur, 511 stig, nr. 2 Eirikur í Jákupsstovu, Ørvur, 503 stig og 13 10-arar, nr. 3 Sjúrður Rein, Tambar, 503 stig og 10 10-arar, og nr. 4 Øssur Hansen, Vágaskot, 499 stig.

Í hálvfinalunum møttust Rógvi og Øssur, dysturin endaði 109-102. Í hinari hálvfinaluni møttust Bjarni Rasmussen, Tambar og Sjúrður, og í spennandi dysti vann Bjarni 96-95.

Bronsufinalan var síðan millum Sjúrð og Øssur og endaði við 108-99.

Í finaluni møttust Rógvi og Bjarni og vann Rógvi dystin 102-98, og vann Rógvi sostatt føroyameistarheitið í recurve.

Kappingin bleiv stuðlað av Statoilstøðini í Saltangará.

# Norðurírskur landsliðsvenjari vitjar KÍ

**Um vikuskiftið vitjar U21 landsliðsvenjarin hjá Norðurírlandi í Klaksvík. Roy Millar kemur til Klaksvíkar at halda skeið fyri venjarunum hjá KÍ og at venja onkur av ungdómsliðunum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

KÍ hevur forkunnuga vitjan um vikuskiftið. Roy Millar, sum er leiðandi venjari í írska fótbóltssambandinum og venur norðurírska U21-landsliðið, kemur á vitjan í Klaksvík hóskvøldið. Hann stegðar her um vikuskiftið og fer av landinum aftur mánamorgunin.

Roy Millar kemur til Klaksvíkar at halda skeið fyri venjarunum hjá KÍ, og hann fer eisini at venja onkur ungdómslið.

Harafturat fer hann eisini at hava fundir við høvuðsvenjaran og ungdómsvenjaran í KÍ um talentmenning og annað.

**Íblástur út útlandinum**

Ein av føstu táttunum í ungdómsarbeiðnum hjá KÍ er, at felagið javnan roynir at fáa íblástur uttanífrá. Í fjør vitjaði til dømis kendi hollendski venjarin, Foppe de Haan, í felagnum, og fyri tveimum árum síðani stóð venjari úr Liverpool FC fyri fótbóltsskúla hjá KÍ.

Roy Millar er dugnaligur og garvaður venjari. Hann er tann persónurin, sum hevur starvast longst fyri írska fótbóltssambandið, Irish Football Association (IFA), og í fjør kundi hann halda 30 ára jubileum.

Roy Millar hevur gjøgnum árini vant fleiri ungdómslandslið hjá Norðurírlandi, og í 2001 fekk hann ábyrgdina av U21 landsliðnum hjá Norðurírlandi. Hesa uppgávu røkir hann framvegis, samstundis sum hann er leiðandi venjari, Director of Coaching, í IFA. Har er ein av hansara uppgávum at standa fyri einari nýggjari skipan, sum skal menna ungar fótbóltsspælarar í landinum.

Roy Millar er eisini instruktørur til hægstu venjaraútbúgvingina hjá FIFA og UEFA, og hann ferðast javnan sum eygleiðari til EM og HM-kappingar.



*Roy Millar er undirvísari til hægstu venjaraútbúgvingina hjá FIFA og UEFA, og hann ferðast javnan sum eygleiðari til altjóða fótbóltskappingar*

## FSF við nýggjum listum

Fótbóltssambandið hevur gjørt ein lista yvir allar teir spælararnar, sum hava loyvi at spæla fyri tey ymsu føroysku fótbóltsfeløgini. Listin er lagdur á heimasíðuna hjá FSF, og hetta fyri at skapa opinleika, og at feløgini, og øll onnur áhugað, kunnu síggja hvar ymsu leikararnir hava spæliloyvi.

– Ein kendur trupulleiki er, at leikarar, sum altíð hava leikt fyri sama felag, ikki eru skrásettir av fyrstan tíð. Fyri at fáa yvirlitið yvir spæliloyvir dagført, er eitt oyðublað lagt á heimasíðuna, har feløg kunnu skráseta hesar leikarar. Oyðublaðið skal eisini nýtast, tá nýggir limir verða skrásettir í felagnum, skrivar FSF á heimasíðu sínari.

Yvirlitið á heimasíðuni er gjørt sambært skrásetingunum hjá FSF, og er sjálvandi møguleiki fyri, at skrásetingar mangla. Tí verður heitt á feløgini um, at hyggja yvirlitið yvir spæliloyvir í felagnum ígjøgnum, og at senda FSF møguligar rættingar, so at yvirlitið kann verða so dagført sum gjørligt.

## Fundur við teir fremstu

Leygardagin 25. mars 2006 verður skipað fyri venjarafundi fyri venjararnar í Formula-deildini. Á fundinum verða Jógvan Martin Olsen, John Petersen og Magni Mohr við. Fundurin byrjar í FSF-húsinum kl. 19.00 leygarkvøldið, og har bjóðar FSF døgurða. Síðani verður kunning um landsliðsvirksemi og framtíðarætlanir. Magni Mohr fer at greiða frá fysiskum test av landsliðsspælarum, og síðani er orðið frítt.

## Klinsmann við svørtubók

Týski landsliðsvenjarin Jürgen Klinsmann fekk nakað av luft í sínum starvi, tá ið Týskland mikukvøldið vann heili 4-1 á USA, sum verður mett sum nummar 5 á FIFA-styrkislistanum. Sigurin kom sera væl við eftir 4-1 eyðmýkingina ímóti Italia herfyri.

– Hetta hevur ikki verið lætt, men nú veit eg, hvørjir mínir fíggindar eru, so eg veit, hvørjum eg skal halda eyga við, sigur Klinsmann og fjalir ikki útyvir, at til dømis Stefan Effenberg er komin í svørtubók hjá honum.